## Aker Seafood verri úrslit



Tað er ikki bara føroyska fiskivinnan, sum gongur trekari orsakað av høgum oljuprísum og lágum dollara. Fyrsta fjórðingsár í ár er ikki tað besta, sum fyritøkan Aker Seafood hjá norska ríkmanninum, Kjeld Inge Røkke, hevur sæð. Hóast eina øking í umsetninginum fyrsta fjórðingsár í ár upp á stívliga 36 norskar miljónir krónur, er úrslitið kortini helvtina verri enn sama fjórðingsár í fjør. Rakstrarúrslitið fyri avskrivingar er minkað úr 12,7% fyri fyrsta fjórðingsár í fjør niður í 9,2% fyrsta fjórðingsár í ár. Orsøkin er í fyrsta lagi, at felagið hevur gjørt íløgur í keypt virksemi, eitt nú í Fraklandi. Úrslitið eftir skatt er 17 miljónir norskar krónur, og tað er helvtina minni enn somu tíð í fjør. Orsøkin til lakaru gongdina, er, at norska krónan er økt, og at oljuprísirnir eru hækkaðir. Samstundis er dollarin minkaður í virði. Norska krónan er nevniliga økt 16% í mun til dollaran í eitt ár. Aker Seafood væntar kortini, at málið hjá felagnum at náa teimum 3 miljardunum í umsetningi, man fara at vera í nánd, tá árið er úti. Tað er Fiskaren, sum ber tíðindini um gongdina í felagnum hjá norska ríkmanninum.

# Stríðsval dregur fólk til fundar



*Einki stríðsval og ongar grundleggjandi ósemjur komu fram á landsfundi Sambandsfloksins í vikuskiftinum. Á myndini, Kaj Leo Johannesen, formaður og Jóhan Dahl, næstformaður*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Landsfundur Sambandsfloksins savnaði ikki so nógv fólk hesaferð, sum onkuntíð áður. Tá formansval hevur verið, hava onkuntíð tvífalt so nógv fólk verið á fundi sum á landsfundinum í vikuskiftinum, tá fundurin ikki var so væl møttur**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, hevði einki mótvalevni til formanssessin í flokkinum á landsfundi floksins, sum varð hildin um vikuskiftið.

Landsfundurin, sum varð hildin í Róðrarneystinum á Argjum, byrjaði klokkan 19 fríggjakvøldið.

Tað var formaður í landsfelagnum og soleiðis eisini formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, sum setti fundin, og síðan greiddi floksskrivarin Helgi Abrahamsen frá virkseminum í farna ári.

Á skránni var eisini fíggjarliga støðan hjá flokkinum, og her var tað kassameistarin, sum legði fram grannskoðaðan roknskap, sum landsfundurin samtykti.

### Einki mótvalevni

Á skránni fríggjakvøldið var eisini val av formanni og næstformanni til landsfelagið.

Formaðurin í landsfelagnum, sum er Kaj Leo Johannesen, er samstundis formaður í Sambandsflokkinum.

Sitandi formaður og næstformaður, Kaj Leo Johannesen og Jóhan Dahl, halda báðir fram, tí einki mótvalevni var til hesar postar í flokkinum hesaferð.

Fríggjakvøldið var eisini val av grannskoðara og varagrannskoðara.

Eini 60-70 fólk vóru á landsfundi Sambandsfloksins, og tað er út við helmingurin minni, enn tá val hevur verið um formanssessin í flokkinum.

Onkur helt skemtiliga fyri í práti, at kanska skuldi stríðsval verið í flokkinum annaðhvørt ár, tí so hevði fundurin verið betur møttur.

### Politiskt kjak

Leygarmorgunin vóru framløgur, har lagt varð upp til politiskt kjak, og fyrstur at leggja fyri var formaður floksins, Kaj Leo Johannesen.

Danski fólkatingslimurin, fyrrverandi ráðharrin og formaður í fólkatingsbólkinum hjá Venstre, Hans Christian Schmidt, var gestarøðari.

Tá landsfundurin uppundir endan av leygardegnum var vorðin samdur um eina yvirlýsing í fleiri punktum, fóru fólk til hús at gera seg klár til veitslu, sum varð hildin í Róðrarneystinum á Argjum um kvøldið.



*Formaðurin í fólkatingsbólkinum hjá Venstre og fyrrverandi danski ráðharrin, Hans Christian Schmidt, var gestarøðari á landsfundi Sambandsfloksins*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Fastar reglur mugu gerast um uppstilling

**- Næstu ferð mugu vit gera nakrar fastar reglur fyri, hvussu uppstillingin skal fara fram, segði Helgi Abrahamsen, floksskrivari, á landsfundi Sambandsfloksins**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í skránni á landsfundi Sambandsfloksins fríggjakvøldið var eitt nú framløgan hjá Helga Abrahamsen, floksskrivara, sum greiddi frá farna ári.

- Árið hevur verið merkt av, at vit hava havt bæði løgtings-og fólkatingsval. Valstríð eru altíð krevjandi.

Helgi takkaði øllum teimum, sum hava arbeitt fyri flokkin og hava stuðlað flokkinum á hesum báðum valunum.

- Hvussu valini eydnaðust, eru altíð fleiri meiningar um, men vit kunnu ikki síggja burtur frá, at vit vunnu fólkatingssessin aftur, sum vit mistu í 2005, og Sambandsflokkurin er næststørsti flokkur á tingi.

### Uppstillingin

Helgi Abrahamsen vísti á, at uppstillingin til seinasta løgtingsval var øðrvísi enn undanfarin ár, nú Føroyar eru vorðnar eitt valdømi.

- Tíðin frá tí, at lógin varð samtykt, og til vit skuldu gera brúk av henni, var ógvuliga stutt. Tí virkaði alt nokso kaotiskt.

Hann helt kortini, at hóast onkran smávegis trupulleika, spældi alt val av.

- Men næstu ferð mugu vit í Sambandsflokkinum tó gera nakrar fastar reglur fyri, hvussu uppstillingin skal ganga fyri seg, segði floksskrivarin.



*Helgi Abrahamsen er floksskrivari í Sambandsflokkinum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*